# Súlurnar væl fyri



*Súla við stórum ompli 19. juli 2007.*



*Súlurók 19. juli 2007. Omplarnir (dúnungarnir) eru hvítir við svørtum nevi.*

*Bergur Olsen*

### Ompil í hvørjum reiðri

Hóast tað hevur verið óvanliga svangligt hjá teimum flestu sjófuglunum í summar, so eru súlurnar væl fyri. Sum sæst á myndini, er stórur ompil (dúnungin hjá súlu) í næstan hvørjum reiðri. Orsøkin, til at súlan klárar seg so væl, er, at hon livir av størri fiski enn annar sjófuglur, og at hon kann fara langa leið eftir føði, bæði til sín sjálvs og til ungan. Føðina til ungan goymir hon í maganum, til hon kemur heim, og ungin etur so úr hálsinum á súluni. Vanligasta føðin hjá súlu er seiður, sild, makrelur, nebbasild og høgguslokkur. Álitið hjá flestu sjófuglunum er nebbasild, og hon sær út til at hava svikið seinastu árini.

### Myndir tiknar av øllum súlunum

Fiskirannsóknarstovan hevur eftirlit við hvussu súlustovnurin trívist, og í tí sambandi verða m.a. myndir tiknar av súlunum bæði frá landi og úr báti, og so verða súlurnar taldar eftir myndunum.

### Talið á súlum í Mykinesi hevur verið støðugt ella í vøkstri seinastu 200 árini.

Sambært gomul veiðitøl, so hava helst ikki fleiri súlur átt í Mykinesi seinastu 200 árini enn tær gera í dag. Tá vórðu veiddar 200 hvítsúlur (vaksnar súlur) og 200 grásúlur (fjaðraðir ungar). Tá tey fyrstu fólkini komu til Mykinesar, var helst meira til, og tá átti súlan kanska uppi á sjálvum Mykineshólmi. Tær súlurnar, sum fólk slapp fram at, eru so tiknar so við og við, til bert tær vóru eftir, har fólk ikki slapp uttan í línu.

### Eitt miðal súlubøli í støðd

Súlubølið í Mykinesi er eitt miða bøli í mun til bøli í øðrum londum. Eini 2400 pør av súlum eiga í Mykineshólmi, Píkarsdrangi og Flatadrangi. Fimm pør eiga á sjálvari oynni, men hóast tey fyrstu pørini vórðu sædd longu í 1930 árunum, so hevur ongin vøkstur verið her. Harafturímóti er Bølið, sum er lendið beint innan fyri drangarnar, vaksið. Her sótu 50 súlur í 1972, og nú sótu einar 300. Fleiri súlur leggjast til á hvørjum ári og bæði havhestur og lundi, sum eigur har, má víkja fyri súluni.

### Røkt av súlunum

Í seinastuni hevur veiðan verið á einum støði, so stovnurin hevur verið støðugur, ella í einum lítlum vøkstri. Fyri meira enn hálvt hundrað árum síðani góvust menn at taka hvítsúlu, tí teir sóu, at súlan var í minking, og Mikkjal á Ryggi skrivar í 1951, at síðani tá er hon væl nørd.

Møguleiki er tó fyri, at stovnurin kann veksa enn skjótari, tí alla staðni uttan um okkum, veksa stovnarnir nógv skjótari enn tann føroyski. Í hesum londum er súlan at kalla friðað, og tað ger sjálvandi stóran mun. Um vit minkaðu eitt sindur um veiðuna, hevði tað óivað bøtt um gongdina.

Eisini kann verða roynt at verja tær súlurnar, sum reiðrast ovast í Mykineshólmi, so tær kunnu koma upp á slætt at eiga. Sum nú er, verða súlurnar órógvaðar av fólki og seyði, um tær ætla sær at reiðrast uppi á sløttum. Tí kundi t.d. verið áhugavert at stika hesi øki av. Um súlan kemur upp á slætt, so er møguleiki fyri at stovnurin fer at vaksa í stórum, tí tað er á slíkum plássum, súlan er vaksin mest aðrastaðni. Ikki bert súlur, sum eru vaksnar upp nærhendis taka hesi øki, men ungar súlur koma eisini til frá øðrum súlubølum.

### Veiðan í Føroyum er lutfalsliga stór

Í Føroyum verða í miðal 470 grásúlur veiddar um árið av einum stovni, sum bara er um 2400 pør. Í Íslandi, har stovnurin er 10 ferðir so stórur, verða veiddar 700 grásúlur og í Skotlandi, har stovnurin er um 100 ferðir so stórur, er kvotan 2000 grásúlur. Orsøkin, til at føroyski stovnurin hevur tolt eina so stóra veiðu, er helst, at ein stórur partur av teimum ungu súlunum, sum eru komnar til á hvørjum ári, er fuglur aðrastaðni frá.


HAVNAR BIO
kall Coca-Cola




**Min skøre familie Robinsons**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 14.08 | kl. 16.00 | kl. 18.15 |
| Mikudag | 15.08 | kl. 16.00 | kl. 18.15 |
| Hósdag | 16.08 | kl. 16.00 | kl. 18.15 |




**Kollegiet**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 14.08 | kl. 20.00 | kl. 22.45 |
| Mikudag | 15.08 | kl. 20.00 | kl. 22.45 |
| Hósdag | 16.08 | kl. 20.00 | kl. 22.45 |




**The Simpsons – The Movie**

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 14.08 | kl. 20.30 |
| Mikudag | 15.08 | kl. 20.30 |
| Hósdag | 16.08 | kl. 20.30 |




**Du almægtige, Evan**

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 14.08 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 15.08 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 16.08 | kl. 22.15 |




**Harry Potter og Fønixordenen**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 14.08 | kl. 17.00 | |
| Mikudag | 15.08 | kl. 17.00 | |
| Hósdag | 16.08 | kl. 17.00 | Seinasta sýning |

**Komandi filmar:**

THE BOURNE ULTIMATUM

**The Bourne Ultimatum** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu
www.bio.fo • Telefon 31 19 56